

# Selatrað í føgrum summarveðri

Heini S. Kristiansen

**Sosialurin var týsdagin ein túr á Selatrað. Veðrið var sera gott, og flotta umhvørvið á Selatrað ger staðið til eitt rættiligt dreyma-útferðarstað.**

**Friðarliga bygdin man vera sera væl egnað til at kobla av í. Tað liggja nógv summarhús á Selatrað og norðaliga í bygdini liggur høvuðsstøðin hjá skótunum í Føroyum. Hóast dýrdarveður og flotta umhvørvið, vóru eingin ferðafólk at síggja. Tað er kanska ein veikleiki, at tað ikki eru serliga góðir gistingarmøguleikar í bygdini. Ei heldur er nakað upplagt tjaldingarpláss.**

**Bygdin burdi heilt vist verið eitt av teimum støðunum, sum var eitt "must" hjá útlendskum ferðafólkum at upplivað. Eisini hevði tað verið upplagt hjá føroyingum, sum eru búsitandi aðrastaðni í landinum at ferðast á Selatrað.**

**Plantagan er vælegnað til útferðir og stuttlig hjá børnunum at spæla í. Niðri í bygdini er nógvur fríur bøur og ein lítil strond. Tað ber væl til at rógva við jollu á fjørðini og eisini at fiska.**

**Stutt sagt er Selatrað eitt upplagt evni til eina summarútferð.**

Havn at ordna sær dekkini. Tað er tann lági prísurin hjá mær, sum dregur, sigur Jákup.

– Eg hevði eisini matvøruhandil. Hann lat tó aftur í byrjanini av 90´unum. Nú heldur handilin fram sum dekksøla og fiskaútflutningur. Handilin hevur hátíðarhald í ár, nú hann hevur verið opin í 150 ár.

Einahandilin varð avtikin 1. januar í 1856. Handilin á Selatrað opnaði í februar sama ár, og sostatt var hann ein av teimum fyrstu handlunum, sum opnaðu eftir einahandilin.

– Tað var verpápin hjá langabba, sum opnaði handilin. Síðani hevur familjan rikið handilin. Pápi mín rak hann frá 1934 til 1992. Eftir tað tók eg yvir, men tað gjørdist ógjørligt at reka handil á so lítlum stað.

– Tað var alt ov dýrt at keypa vøru frá heilsølunum. Eg fekk vøruna bíligari frá Bónus enn frá heilsøluni. Við tí góða vegasambandinum og teimum góðu akførunum í dag er eingin trupulleiki at ferðast eitt sindur til at keypa inn. Tí gavst eg við matvøruhandilinum, men eg haldi fram við fiska- og dekksøluni.

### Putlast í havanum

Jákup hevur ikki nakrar trupulleikar av at vera noyddur at ferðast av bygdini, um hann skal keypa okkurt.

– Tað hugsi eg als ikki um. Eg plagi at keypa inn á Skála ella á Strondum. Onkuntíð fari eg eisini til Runavíkar at keypa. Tað plágar meg ikki.

Í frítíðini plagar Jákup at fríðka um rundum húsini hjá sær. Hann hevur stóran hava rundanum húsini, og hann hevur plantað nógv trø rundanum.

– Eg ætli mær at kappast við plantaguna, sigur hann flennandi.

– Tað tekur leingi hjá trøunum at vaksa, men eg havi funnið ein góðan máta. Eg taki eina grein av einum træi og seti hana niður. Soleiðis vinni eg eini 2-3 ár, sigur Jákup.

Jákup og hundurin hjá honum fylgja okkum út, tá ið vit fara avstað. Síðani fer Jákup aftur í húsini hjá sær við dekksøluni í garasjuni.



*– Eg reki eisini eina dekksølu, og tað er nóg mikið at gera har. Tað koma fólk úr øllum landinum. Summi koma heilt úr Havn at ordna sær dekkini. Tað er tann lági prísurin hjá mær, sum dregur, sigur Jákup*

*Myndir: Súsanna Kass Kristiansen*